## Seyðahundakapping á Viðareiði

Leygardagin 10. mars verður seyðahundakapping á Viðareiði. Hetta er triðja árið, at kappingin verður á hildin á Viðareiði. Hetta er eisini nakað nýtt sum so í Norðoyggjum.

Kappingin verður í klassa 1, 2 og klassa 3. Í klassa 1 eru teir yngstu hundarnir. Í klassa 2 eru teir hundarnir, ið eru komnir nakað væl longri. Í klassa 3 eru so teir bestu hundarnir í landinum og avstandurin, ið teir verða sendir er umleið 400 metrar.

Byrjað verður um morgunin kl: 10, og tá byrja hundarnir í klassa 3, so tey, ið ætla at síggja hesar hundarnar, mugu verða á staðnum klokkan 10.

Kappingin verður eysturi á Heiðum, har sum Nils Absalonsen hevur fjós.

Steyp og heiðursmerkir verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum bólki.

Steypini og heiðursmerkini eru latin av Statoil. Tá kappingin er liðug, verða steypini handað í gamla skúla á Viðareiði.



# arbeiði fyri uttan



*- Tað fullkomna samfelagið er eitt samfelag, har vit liva í friði og við virðing fyri hvør øðrum, har kvinnur og menn seta sær dreymar fyri framtíðina, og ikki krevja nakað av øðrum, sum viðkomandi ikki kann identifisera seg við, sigur Marita Dalsgaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

er øðrvísi og meira opin. Tað verður flent aðrastaðni í leikinum her enn í Danmark.

**Tosar til kenslurnar**

- Tað krevur, at sjónleikarin er til staðar og alla tíðina lurtar út í salin og ger sær ómak.

Tað veldst eisini um, tú hevur góðan samleika við leiklutin. Um samleikin er í lagi, er sjónleikur altjóða mál, har tú tosar til kenslurnar. So hevur tað minni at týða, um áskoðarin er russi ella turki.

- Eg havi spælt ungdómsleikir og barnaleikir á festivalum, har fólk úr 100 ymiskum londum vóru til staðar, og tey skiltu innihaldið í leikinum. Listin talar til fólk á einum øðrum plani, sigur Marita Dalsgaard.

Talan er eisini um at fara til Russlands við Marie Grubbe seinni.

Marita Dalsgaard fekk prógv sum sjónleikari í Danmark í 2000, og síðani hevur hon havt arbeiði, tó at hon hevur havt farloyvi, tá hon fekk børnini. Hon tosar ræðið ríkisdanskt. Tað hevur ikki volt henni trupulleikar. Hinvegin var tað torførari hjá næmingunum í Júttlandi at læra ríkisdanskt. Hjá teimum gekk ikki so væl at sleppa av við sína dialekt.

- Tað er ikki torført at tosa ríkisdanskt, tí tað rakar meg ikki kensluliga. Málið er bara eitt amboð, men tó dugi eg ikki ymsu dialektirnar, sigur Marita Dalsgaard.

- Hon er sannførd um, at valið av yrki var tað rætta fyri hana. Tá hon hevur verið heima í longri tíð, vil hon sleppa til arbeiðis.

- Eg toli ikki – ikki at vera í eini skapandi proses. Tað er matur og drekka fyri meg, sigur Marita Dalsgaard.

**Børnini ikki bara summargestir**

Spurd, um hon kundi hugsað sær at flutt heimaftur, sigur Marita Dalsgaard: - Eg kundi hugsa mær at havt tættari tilknýti til Føroyar, tó at vit búgva í Danmark. Vit hava ein dreym um at arbeiða í Føroyum ein part av árinum, eisini fyri at børnini kunnu fáa veruligt samband hendavegin. Tey skulu tosa føroyskt og ikki bert vera summargestir í Føroyum.

Marita Dalsgaard hevur saman við øðrum stovnað leikbólkin "Skift", sum í fjør framførdi leikin "Eg taki tína hond í mína", og í heyst er ætlanin at seta leikin "The Laramie Projekt", ein ameriskur leikur um samkynt, upp í Føroyum.

Bæði Marita og Olaf Johannesen eru freelance sjónleikarar. Tað merkir m.a., at tey sjálvi kunnu gera av, hvørjar leikir tey vilja spæla.

Marita: - Tá eg havi valt at gerast sjónleikari, vil eg eisini hava ávirkan á, hvat eg vil spæla. Velji eg ein leik, sum ikki eydnast, so er tað mín skyld, og so er tað í lagi. Bert vil eg ikki, at onnur skulu skalta og valta við míni leiklist.

**Kvinnuleikluturin í broyting**

*- Hvussu er kvinnuleikluturin í 2007?*

- Tað er m.a. at hava starvsbreyt og føða børn. Sjálv fór eg til arbeiðis góðan mánaða, eftir at eg hevði átt yngsta barnið. Tað var ov nógv av tí góða, men eisini treytin fyri at eg yvirhøvur kom í gongd, eftir at eg hevði átt. Tað ber ikki til at hava familju og arbeiði, um tú ikki hevur ein partnara, sum stuðlar teg.

Kvinnnuleikluturin er tó í broyting í løtuni, og tað er ótrúliga jaligt, at fleiri kvinnuligir leiðarar eru við at koma sær fram. Tað sæst eisini týðiliga í tí, at leikritahøvundar skriva leikrit, har høvuðsleikarin er kvinna.

Onnur minni góð broyting er, at kvinnan leggur so so stórt trýst á seg sjálva. Heimið skal vera vakurt innrættað og ruddiligt og børnini glað og snøgg: Kravið til stiling hjá kvinnum er eisini økt munandi. Í dag brúkar kvinnar ein tíma og 12 minuttir meira dagliga upp á sína útsjónd enn fyri 20 árum síðani.

*- Hvat heldur tú er tað fullkomna í tínari verð?*

- Tað er eitt samfelag, har vit liva í friði og við virðing fyri hvør øðrum, har kvinnur og menn seta sær dreymar fyri framtíðina, og ikki krevja nakað av øðrum, sum viðkomandi ikki kann identifisera seg við, sigur Marita Dalsgaard.